## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av vestri og regn, seinnapartin nakað minni vindur av útnyrðingi og ælingur. Hitin fyrapartin upp í 10 stig, um kvøldið niður í 5 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, um kvøldið upp í ein strúk av norði. Ælingur, sum fráliður kavi og hitin 3 og 6 stig. Fríggjanáttina frost.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og kavaælingur. Hitalagið millum ÷1 og ÷4 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av norði og kavaælingur, men sunnudagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷2 og +2 stig.

# So kom Potter umsíðir




*Sætta bókin hjá J.K. Rowling um Harry Potter er nú komin á føroyskum*

**Seinasta útgávan hjá Bókadeildini ár er ongin minni enn mest umrødda bókin í longri tíð. Umsíðir liggur føroyska týðingin av nýggjastu Harry Potter bókini í bókabúðunum**

POTTER

Í Harry Potter og Hálvblóðsprinsurin økist spenningurin enn meira, og enski rithøvundurin J.K.Rowling megnar enn eina ferð at seta saman eina frálíka søgu um muglarar og gandafólk, eina søgu um tað ónda og góða í okkum øllum.

Harry er í summarfrí hjá Dursley familjuni, har hann fyri tað mesta hevur ligið í songini og syrgt deyða Sirius og minst aftur á tað øtiligu uppgerð við deyðsátarararnar og Gandamálaráðið og skakandi hólmgonguna millum Dumbledore og Lord Voldemort. Tá ið søgan byrjar, situr hann fjáltraður og bíðar eftir, at Dumbledore skal koma at vitja, tí hvat er tað, sum ikki kann bíða til Harry er aftur á Hogwarts?

J.K.Rowling, sum fekk hugskotið til Harry Potter á eini tokferð frá Manchester til London, hevur nú skrivað sættu bókina, sum Bergur Rasmussen hevur týtt til føroyskt.

Hóast síðutølini eru mong, so hómast ikki møði í skriving hennara. Verðin er framvegis líka einastandi óverulig og deyðilig sum okkara egna.

Harry Potter og Hálvblóðsprinsurin er 561 bls.

**ave**

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -6 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | -4 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 7 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 6 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 10 |
| Athen | 13 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | -1 |
| New Dehli | 18 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 17 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1005 hPa. norðan fyri Ísland fer í landnyrðing og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikunáttina. Eitt annað lágtrýst, 987 hPa. vestan fyri Hvarvið fer móti Grønlandsfjørðinum.




**Í dag:**
Lágtrýstið eystan fyri Ísland fer móti Mið-Skandinaviu og dýpist. Vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft frá Íshavinum móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/12 kl. 06[00]– 13/12. 06[00]. Hitin í gjár: 7,3°
Minsti hiti máldur í des.: -10,5° - Mesti hiti máldur í des.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,1 mm – mált frá 12/12 kl. 06[00]– 13/12 kl. 06[00]
Avfallið higartil í desember: 36,9 mm

ÚF

### Morgunlestrar
12. - 17. des.

***Jaspur Olsen í Vestmanna, lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 12. des.:**
nr. 90 Upp, gleðist allr, gleðist nú
nr. 65 Drottur mín, Krist

**Týsdagin 13. des.:**
nr. 85 Ver glað nú, brúður Krists

**Mikudagin 14. des.:**
nr. 457 Sum morgundøgg, fer øll mín ævi
nr. 349 Klokkan slær, tíðin fer

**Hósdagin 15. des.:**
nr. 73 Kæri Jesus, eg vil bíða

**Fríggjadagin 16. des.:**
nr. 74 Góði Jesus, Harri mildi
nr. 61 Harrans hondum

**Leygardagin 17. des.:**
nr. 320 Ger tað sindrið, tú kanst
nr. 317 Hvørja hugsan og hvørt orð

## VESTFALLSKYRRINDI

5. desember Mánin næstur jørðini
8. desember Fyrra kvarter
15. desember Fullmáni
21 desember Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. Des | 04.25 | 16.50 | 03.25 | 15.50 | 03.40 | 16.05 | 06.25 | 18.50 | 07.25 | 19.50 | 02.40 | 15.05 | 01.40 | 14.05 | 04.40 | 17.05 | 05.40 | 18.05 | 04.10 | 16.35 | 05.25 | 17.50 |
| 14. Des | 05.15 | 17.40 | 04.15 | 16.40 | 04.30 | 16.55 | 07.15 | 19.40 | 08.15 | 20.40 | 03.30 | 15.55 | 02.30 | 14.55 | 05.30 | 17.55 | 06.30 | 18.55 | 05.00 | 17.25 | 06.15 | 18.40 |
| 15. Des | 06.06 | 18.31 | 05.06 | 17.31 | 05.21 | 17.46 | 08.06 | 20.31 | 09.06 | 21.31 | 04.21 | 16.46 | 03.21 | 15.46 | 06.21 | 18.46 | 07.21 | 19.46 | 05.51 | 18.16 | 07.06 | 19.31 |
| 16. Des | 06.56 | 19.22 | 05.56 | 18.22 | 06.11 | 18.37 | 08.56 | 21.22 | 09.56 | 22.22 | 05.11 | 17.37 | 04.11 | 16.37 | 07.11 | 19.37 | 08.11 | 20.37 | 06.41 | 19.07 | 07.56 | 20.22 |
| 17. Des | 07.48 | 20.12 | 06.48 | 19.12 | 07.03 | 19.27 | 09.48 | 22.12 | 10.48 | 23.12 | 06.03 | 18.27 | 05.03 | 17.27 | 08.03 | 20.27 | 09.03 | 21.27 | 07.33 | 19.57 | 08.48 | 21.12 |

5 707265 100036 >